LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Almannaverkið
Staravegur 18
Postsmoga 3096
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 7. oktober 2019
J.Nr.: LUM-20- 19/00062-21
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Viðvíkjandi klaguni hjá A**

Tann 12. juli 2019 kunnaði eg Almannaverkið um klaguna frá A, har hon klagar um, at Als skipanin og dagpeningaskipanin ikki tryggja persónar, sum vegna serligar umstøður, m.a. hava sjúkt barn, ikki kunnu átaka sær fulltíðarstørv. Víst var í hesum sambandi til avgerð frá kærunevndini í almanna-, familju- og heilsumálum 5. september 2018, málstal 18/00115 og avgerð frá kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini frá 27. februar 2019, málstal 18/00206. Eg havi ikki viðmerkingar til nevndu avgerðir, og eg havi tí boðað klagaranum frá, at eg ikki geri meira við hesi klagupunktini, sí avrit av hjálagda skrivi til klagaran.

Í klaguni greiddi klagarin frá, at hon hevði barn við serligum tørvi, og at hon av hesum fekk veiting frá Almannaverkinum vegna inntøkutap fyri hálva tíð og arbeiddi hálva tíð. Vegna óhaldbara arbeiðsstøðu og privatar avbjóðingar, segði klagarin seg úr starvi í februar 2018 og fekk hon sína síðstu løn síðst í mars 2018. Stutt eftir hetta varð hon sjúkrameldað, men kundi hon tá hvørki fáa veiting frá Als ella dagpengar. Seinni fekk hon forsorgarveiting játtað frá 19/4-18. Í hesum sambandi vísti klagarin á, at hon boðaði Almannaverkinum frá óhaldbaru arbeiðsstøðuni og privatu avbjóðingunum, sum hon var í, men at frá Almannaverkinum fekk hon ikki nakra ráðgeving um framtíðar møguleikar og fylgjurnar av, at hon segði seg úr starvi. Klagað varð tí eisini um, at kunningin frá Almannaverkinum, áðrenn klagarin segði seg úr starvi, var ov vánalig. Eg bað tí í hesum sambandi Almannaverkið um at lata mær skjølini í viðkomandi málum hjá Almannaverkinum

Tann 7. august 2019 móttók eg umbidnu skjøl frá Almannaverkinum

Av móttiknu skjølunum sást, at klagarin í teldupostsamskifti við Almannaverkið tann 9. november 2017 vísir til prát / fund við Almannaverkið, har klagarin m.a. spurdi um, hvørjir møguleikar eru fyri t.d. farloyvi frá arbeiðinum til hvíld til sín. Tann 10. november 2018 fekk hon svar frá Almannaverkinum um, at hon nokk ikki hevði rætt til endurgjald fyri fullan

inntøkumiss, um hon tók farloyvi, men at hon mátti senda eina umsókn, so Almannaverkið kundi taka støðu til hetta. Tann 23. nov. 2017 sendi klagarin umsókn um endurgjald fyri inntøkumiss fulla tíð. Í umsóknini skrivar klagarin, at hon hevur tørv á hvíld / farloyvi frá arbeiðinum t.d. 3 mánaðar vegna tað, sum hon hevur verið ígjøgnum. Tann 26. januar 2018 fekk klagaran noktandi avgerð frá Almannaverkinum uppá hesa umsókn grundað á, at barnið er á stovni hálva tíð.

Í februar 2018 varð støðan hjá klagaranum vorðin so strongd, at klagarin sá ikki annan útveg enn at siga seg úr starvi.

Tann 19. august 2019 sendi eg Almannaverkinum skriv, har eg vísandi til móttiknu skjøl og ávíst samskifti millum klagaran og Almannaverkið um farloyvi til sín sjálvs, tá hon var og tosaði við Almannaverkið, bað um at fáa upplýst, nær hesin fundur hevði verið og avrit av notatinum frá fundinum.

Tann 6. september 2019 svaraði Almannaverkið, at tað framgongur ikki av málinum, nær hesin fundur hevur verið, og at Almannaverkið hevur heldur ikki nakað notat frá hesum fundi.

*Niðurstøða*
Hendan klagan snýr seg um, hvørt vegleiðingin frá Almannaverkinum til klagaran var nøktandi, áðrenn klagaran vegna óhaldbara arbeiðsstøðu og privatar avbjóðingar segði seg úr starvi, varð sjúkrameldað og í eitt stutt tíðarskeið hvørki kundi fáa veiting frá ALS ella sjúkradagpening.

§ 1 stk. 2 og 3 í Forsorgarlógini (lovbekendtgørelse nr. 100 af 2. marts 1988 om offentlig forsorg) er soljóðandi :

> "Stk. 2 Der skal efter regler, som fastsættes af Landsstyret, gives befolkningen vejledning om rettigheder efter den sociale lovgivning.
> Stk. 3 Landsstyret kan fastsætte regler om, at der skal kunne ydes råd og vejledning i spørgsmål af forsorgsmæssig og personlig art."

Við heimild í § 1 stk. 2 ( stk. 3 manglar sum heimildarávísing) er sett í gildi kunngerð nr. 38 frá 22. mars 1993 um ráðgeving og vegleiðingarskyldu sambært forsorgarlógini.

Kunngerðin er deild upp í tveir partar. Tann fyrri parturin er um almenna ráðgeving og vegleiðing og er sambært § 1 avmarkað til at kunna almenningin um rættindi sambært almannalóggávuni. Seinni parturin er um persónliga ráðgeving og vegleiðing og er ikki avmarkaður til ráðgeving innan almannalóggávuna.

Í §§ 4 og 5, er ásett, hvat persónliga ráðgevingin kann fevna um. Greinarnar eru soljóðandi :

> "§ 4 Almannastovan og kommunalar sosialar deildir skulu bjóða støkum og familjum teirra framhaldandi vegleiðing, Endamálið við vegleiðingararbeiðinum er í fyrstu syftu at hjálpa viðkomandi persónum og familjum við teimum í løtuni verandi trupulleikunum, men eisini at gera

> tey betri før fyri frameftir at loysa íkomandi trupulleikar sjálvi. Vegleiðingin kann verða givin sjálvstøðugt ella saman við aðrari hjálp ella stuðli.
>
> § 5 Vegleiðingin kann vera antin samrøður við persónin ella familjuna um umstøður teirra, ella at fáa í lag samband við aðrar myndugleikar umframt stuðul til at megna verkligar trupulleikar. Sum dømi kunnu nevnast fíggjarligir trupulleikar, vánaligar bústaðarumstøður, heilsuligar og arbeiðsligir trupulleikar.”

Eg haldi, at málsgongdin og málsupplýsingarnir greitt vísa, at klagarin hevur kunnað Almannaverkið um truplu arbeiðsstøðuni og persónligu støðu sína, sum gjørdu, at hon hevði trupult við at megna gerandisdagin. M.a. upplýsir klagarin yvirfyri Almannaverkinum, at hon hevur tørv á 3 mðr hvíld til sín sjálvs ella farloyvi fyri at koma fyri seg. Klagarin søkti endurgjald fyri inntøkumiss fulla tíð og fekk hetta noktað, tí barnið við serligum tørvi var á stovni hálva tíð. Almannaverkið ger tá ikki meira við støðu klagarans, hóast tað er týðiligt, at talan er um eina strongda støðu.

Eg haldi, at tað er í júst í slíkum støðum, at Almannaverkið eigur at hugsa um sína vegleiðingarskyldu. At siga seg úr starvi í tí støðu, sum klagarin var í, kann viðføra eina sera óvissa og óhaldbara støðu fyri klagaran bæði fíggjarliga, arbeiðsliga og persónliga. Eg haldi, at Almannaverkið longu í sambandi við, at Almannaverkið noktaði stuðul vegna inntøkutap fyri fulla tíð, átti at bjóða klagaranum til samtalu og vegleitt klagaran um at kanna møguleikarnar fyri sjúkramelding, so klagarin harvið ikki kom í tí óhepnu støðu, sum hon kom í vegna egna uppsøgn og uttan møguleika fyri dagpeningi ella Als veiting. Eg haldi tí, at Almannaverkið hevur ikki yvirhildið persónligu vegleiðingarskylduna í hesum føri.

Almannaverkið hevur svarað mær, at fundurin millum klagaran og Almannaverkið, har klagarin spurdi um viðurskiftini við at taka hvíld / farloyvi frá arbeiðinum eina tíð, er ikki skrásettur í máli klagarans, og ei heldur finst nakað notat frá hesum fundi.

Sambært § 6 í innlitslógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina) er ásett, at í málum, har avgerð fer at verða tikin av einum myndugleika, skal myndugleikin, sum munnliga tekur ímóti upplýsingum viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum, ið hava týdning fyri avgerðina í málinum, skriva upp innihaldið av teimum. Eg haldi, tað er ivasamt, um Almannaverkið hevði notatskyldu eftir § 6 í sambandi við umtalaða fundin við klagaran, tí tað er óvist um upplýsingar skuldu nýtast til eitt avgerðarmál. Men uttan mun til um § 6 í innlitslógini er galdandi í hesum føri, so átti Almannaverkið sambært góðum fyrisitingarsiði at skjalfest fundin við einum notati, so greitt varð, hvat fór fram á fundinum. Tað er tí ikki nøktandi, at Almannaverkið hvørki kann dagfesta fundin ella hevur nakað notat frá fundinum við klagaran.

Samanumtikið fari eg tí at geva Almannaverkinum eina átalu fyri handfaringin av hesum máli.

Burtursæð frá hesi átalu geri eg ikki meira við málið.

Avrit av skrivinum er sent til klagaran.

Skrivið verður í næstum í navnleysum líki lagt á heimasíðu okkara lum@lum.fo

Vinarliga

Sólja í Ólavsstovu
Løgtingsins umboðsmaður